# Ferðaseðlaprísurin má broytast

**Vágatingmenninir Marjus Dam og Jóanis Nielsen halda fast við, at prísurin fyri at nýta undirsjóvartunnilin má broytast. Hómast eingin broyting innan fáar dagar, fara teir at leggja uppskot fyri løgtingið um at flyta raksturin av tunnlinum yvir í landskassan.**
**- Málið er av so stórum týdningi fyri Vágoynna, at eg eri til reiðar at gera ímóti viljanum hjá samgonguni, gerst tað neyðugt, sigur Jóanis Nielsen úr Fólkaflokkinum**



*Bummstøðin, har vágafólk og onnur skulu gjalda fyri sleppa undir Vestmannasund, er nú um at vera liðug. Men eftir at prísurin loksins er ásettur, er ónøgdin móti høga prísinum stór*

BUMMGJALDIÐ
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Prísurin fyri at nýta Vágatunnilin má broytast, kosta hvat tað kosta vil, tí verandi prísur fer at gera, at stóra íløgan í fasta sambandið um Vestmannasund als ikki kemur til sín rætt.

Hetta eru vágatingmenninir Marjus Dam úr Sambandsflokkinum og Jóanis Nielsen úr Fólkaflokkinum á einum máli um. Sunnukvøldið var aftur fundur í Vágum millum kommunurnar, vinnuna og løgtingsumboðini í oynni, og har var full semja um, at prísurin er alt ov høgur. Marjus Dam fer so langt sum at siga, at høgi prísurin er at rokna sum ein »krígsavbjóðing« til vágafólk og Vágoynna.

- Politiski viljin má lurta eftir vágafólki, og eg haldi tað vera rímiligt, at tað almenna endurskoðar verkætlanina við tunnlinum, sigur Marjus Dam. Hann vísir á, at upprunaliga var ætlanin at bummgjaldið skuldi fíggja 80 milliónir krónur, men nu fáa vágafólk og onnur, ið nýta tunnilin, eina rokning uppá 20 milliónir um árið, komandi 15 árini.

### Hóttir samgonguna

Jóanis Nielsen úr Fólkaflokkinum, sum er partur av samgonguni, sigur at málið hevur so stóran týdning fyri oynna, at hann er til reiðar at arbeiða ímóti viljanum hjá samgonguni, verður prísurin ikki broyttur. Fólkaflokkurin hevur biðið um fund við leiðsluna fyri P/F Vágatunnilin týsdagin fyri at umrøða, hvussu prísurin kann broytast. Jóanis metir, at tað átti at verið goldin fyri hvørt ferðafólkið sær, tvs. at øll í bilinum skuldu goldið, tí tað hevði økt munandi um inntøkumøguleikarnar hjá P/F Vágatunnlinum. Partafelagið hevur valt eina loysn, har bummstøðin er ómannað, og tí ber ikki til at krevja pengar fyri hvørt ferðafólkið, men Jóanis Nielsen heldur, at støðin t.d. kundi verið mannað um dagin og ómannað um náttina, tá lítil ferðsla er. Umframt hetta heldur Jóanis Nielsen, at tað eigur at verða hugt eftir, um raksturin, ella í hvussu so er partur av rakstrinum, kann flytast yvir í landskassan. Og fyri tað triðja mælir hann til, at afturgjaldstíðin verður longd úr 15 upp í 25 ár. Harumframt heldur hann, at metingin hjá P/F Vágatunnlinum yvir, hvussu nógvir bilar fara at nýta tunnilin, eigur at endurskoðast og setast hægri enn 350 bilar um samdøgrið.

- Her er alt talan um smáar broytingar, ið tilsamans kunnu ávirka prísin rættuliga nógv. Á fundinum vð P/F Vágatunnilin í morgin vænti eg at fáa eina ábending um, hvat ber til, og hvat ikki ber til. Seinni í vikuni vænti eg mær so at síggja, hvørji útlit eru til, at man politiskt finnur eina skilagóða loysn. Men røkist einki fyri eini loysn, so fari eg, saman við Marjus Dam, at leggja uppskot fyri løgtingið um at flyta rakstrarútreiðslurnar hjá partafelagnum yvir í landskassan, sigur Jóanis Nielsen. Hann sigur seg ikki vera bangnan fyri at ganga ímóti viljanum hjá samgonguni í hesum máli.

Kemur uppskotið frá vágatingmonnunum í Løgtingið, so kann lættliga henda, at støðan gerst 16-16, tá atkvøðast skal um málið, tekur andstøðan undir við tí, meðan restin av samgonguni atkvøður ímóti. Jóanis Nielsen sigur, at uppskotið kemur, hóast hann ikki frammanundan hevur tryggjað sær meiriluta fyri tí.

- Finna vit ikki eina loysn, ið førir við sær, at prísurin lækkar munandi, so verður uppskotið lagt fyri tingið, sigur Jóanis Nielsen.

Vágatingmaðurin hjá Fólkaflokkinum metir málið hava so stóran týdning, at hann í síðsta enda er til reiðar at seta stuðul sín til samgonguna uppá spæl, fæst ikki frammanundan ein loysn á málinum, so prísurin fyri at koyra undir Vestmannasund lækkar munandi.

## Fólkaflokkurin fund við P/F Vágatunnilin

**Fólkaflokkurin hevur biðið um fund við leiðsluna fyri P/F Vágatunnilin fyri at finna út av, hvussu leiðslan hevur roknað seg fram til prísin, ið varð kunngjørdur hósdagin. Í oddagrein í Dagblaðnum finst Óli Breckmann, formaður í tingbólkinum hjá flokkinum, hvassliga at prísásetingini**

BUMMGJALDIÐ
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Fólkaflokkurin hevur biðið um fund við leiðsluna fyri P/F Vágatunnilin, eftir at partafelagið nú loksins hevur ásett prísin fyri at nýta fasta sambandið undir Vestmannasund.

Fólkaflokkurin hevði landsfund um vikuskifti, og har var semja um at gjaldið fyri at nýta tunnilin er sera høgt. Jóanis Nielsen, tingmaður flokksins í Vágoynni, sigur, at fundurin við P/F Vágatunnilin, sum skal vera týsdagin, vónandi gevur eina mynd av, í hvønn mun prísurin kann broytast.

Dávid Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunnilin, sigur, at teir altíð eru til reiðar at kunna um sítt virksemi, er áhugi fyri tí, og tí hevur hann einki ímóti at fara á fund við Fólkaflokkin týsdagin.

### Lemjandi atfinningar

Í oddagrein í Dagblaðnum finst Óli Breckmann, formaður í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum, hvassliga at prísinum, ið leiðslan fyri P/F Vágatunnilin hevur ásett fyri at nýta tunnilin.

Niðurstøðan í oddagreinini er, at høgi prísurin avgjørt er við til at halda ferðsluni niðri, tí fólk fara stutt sagt at halda seg aftur við at nýta tunnilin. Óli Breckmann spyr millum annað, hví leiðslan fyri P/F Vágatunnilin við makt roynir at halda bilaferðsluni um Vestmannasundi níðri á 350 bilum um samdøgrið, við at áseta ein so høgan prís. Niðurstøðan er stutt og greitt, at prísásetingin, sæð út frá handilsligum sjónarmiðum, er púra burturvið.

## Mugu halda okkum til fortreytirnar

**Prísurin er settur út frá givnum fortreytum, sum eru galdandi í dag, og tað er tað einasta, sum vit hava at halda okkum til. Tað sigur Dávid Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunnilin, eftir mongu atfinningarnar seinastu dagarnar um at prísurin fyri at koyra undir Vestmannasund er ov høgur**

BUMMGJALDIÐ
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Mongu atfinningarnar seinastu dagarnar um at prísurin fyri at nýta Vágatunnilin hava ikki fingið stjóran fyri P/F Vágatunnilin at endurskoða prísin, ið kunngjørdur var hósdagin í síðstu viku.

- Vit hava ásett prísin út frá fortreytunum, ið eru galdandi í dag, og hesar fortreytir noyðast vit at halda okkum til, til fortreytirnar møguliga broytast. Tað sigur Dávid Reinert Hansen.

Stjórin í P/F Vágatunnlinum sigur, at hann hevði væntað, at atfinningar fóru at koma móti prísinum, men at hetta er prísurin, ið leiðslan fyri P/F Vágatunnilin hevur mett at vera tann rætti.

- Sjálvandi lurta vit eftir atfinningunum, tí tað er jú eisini í okkara áhuga at vita, hvat brúkararnir, tvs. kundarnir, halda, sigur Dávid Reinert Hansen, sum tó ikki hevur ætlanir um at broyta prísirnar, um ikki fortreytirnar fyri verkætlanini eisini broytast.

- Síðan hósdagin hava vit fingið at vita, at summi, m.a. politikarar, eru til reiðar at broyta fortreytirnar fyri verkætlanini, meðan onnur eru ímóti at broyta fortreytirnar. Okkara uppgáva er at arbeiða út frá teimum fortreytum, sum eru galdandi – ikki at reka politik. Koma tað uppskot, ið broyta fortreytirnar fyri verkætlanini hjá P/F Vágatunnilin, so mugu vit fyrihalda okkum til tað, sigur Dávid Reinert Hansen.

### Skeivt at samanbera við landsveg

Dávid Reinert Hansen tekur undir við, at spurningurin um, hvussu nógv fara at nýta tunnilin, er rættuliga sentralur. Leiðslan fyri P/F Vágatunnilin hevur mett, at tað í meðal fara at koyra 350 bilar gjøgnum tunnilin um samdøgrið, meðan onnur hava ført fram, at hetta tal er alt ov lágt.

Stjórin fyri P/F Vágatunnilin metir, at tað er skeivt at samanbera ferðsluna um Vestmannasund við ferðsluna á ávísum strekkjum á landsvegnum.

- Her er talan um at fólk skulu gjalda fyri at koyra um sundið. Tí má ferðslan um Vestmannasund samanberast við eina ferju, tvs. hvussu nógv ferðsla hevði verið, um ein ferja sigldi um sundið, sigur Dávid Reinert Hansen. Hann sigur, at kanningin frá 1999, sum hevur verið partur av grundgevingini fyri prísásetingini, í stóran mun hevur snúi seg um, hvussu fólk reagera uppá prísbroytingar, og hvussu tað møguliga broytir ferðingarmynstrið, tvs. um fólk nýta egnan bil ella buss. M.a. út frá hesum er komið fram til talið 350, sigur Dávid Reinert Hansen.



VIÐMERKINGAR

# Norðoyatunnilin á einum vegamóti

**Løgtingið fer í dag at hava fyrstu viðgerð av uppskoti frá landsstýrinum um at gera broytingar í anlegslógini fyri Norðoyatunnilin, soleiðis at einki verður játtað tvey tey komandi árini, og at síðsta játtanin á fíggjarlógini verður útsett inntil 2009. Í hesum sambandi hava tveir klaksvíkingar, sum búgva í meginøkinum, hesar viðmerkingar til spurningin um fast samband um Leirvíksfjørð**





*Símun Absalonsen, Tórshavn*



*Jóannes Hansen, Toftir*

Fyrsti undirsjóvartunnilin í landinum er um at vera liðugur og í vikuni, sum fór, varð alment, hvussu gjaldið fer at vera fyri at koyra millum Streymoynna og Vágarnar. Politisk semja er um at gera ein undirsjóvartunnil ímillum Eysturoynna og Borðoynna og alternativið, sum var byggjan av ferju til siglingina um Leirvíksfjørð, er heilt slept. Ein spurningur, sum politikararnir eru nógv upptiknir av, er, um farast skal undir hesa verkætlan beinan vegin, ella um best er at bíða nakað, tí at fíggjarkarmar landsins eru so trongir.

Sambært dagsskránni fyri tingfundin týsdagin 19. november, verður anlegslógin viðgjørd á hesum fundinum. Nú er ætlanin at játtanin skal toyggjast uppaftur meiri. Tær 205 milliónirnar skulu játtast soleiðis: í 2002 32,5 milliónir, 2005-2008 32,5 milliónir um árið og 42,5 milliónir í 2009. Tað verður sagt í viðmerkingunum til broytingaruppskotið, at hetta fer ikki at seinka verkætlanini. Tíðin fer at vísa, hvussu tað verður við hesum. Í viðmerkingunum til uppskotið verður sagt, at karmarnir á fíggjarlógunum fyri 2003 og 2004 eru trongir. Tað verður roknað við, at teir verða rúmari, tá ið nýggi Smyril er liðugt goldin. Um hetta verður soleiðis, valdast um raðfestingina, sum fasta sambandið um Leirvíksfjørð fer at fáa.

Í einum sakligum kjaki um er tað altíð týdningarmikið at øll viðkomandi viðurskifti verða lýst, tá ið politikararnir skulu taka støðu. Niðanfyri standandi er okkara ískoyti til kjakið um Norðoyatunnilin júst nú.

### Geografisk lýsing

Bústaðarmynstur føroyinga kann geografiskt flokkast í tríggjar bólkar, sum sambært fólkayvirlitið tann 1. august í 2000 er lutað soleiðis:

- Mistaðarøkið 66,7%
- Fýra størri randarøki 31,9%
- Fleiri smærri randarøki 1,4%

Hyggja vit at teimum størru randarøkjunum fáa vit hesa uppbýting av bústaðarmynstrinum í prosentum:

| | |
|---|---|
| Vágar | 5,7 |
| Suðuroy | 10,8 |
| Sandoy | 3,0 |
| Borðoy, Kunoy og Viðoy | 12,4 |

Landið hevur nýtt nógvan pening at betra um samferðsluna ímillum miðstaðarøkið og randarøkini. T.d ferjur og avleiddar íløgur í ferjulegur, vegir osfr. Hyggja vit at størru randarøkjunum, og hvat landskassin hevur rindað seinastu 15-20 árini fyri at bøta um samferðsluna til og frá miðstaðarøkinum, fáa vit eina hóming av, hvussu íløgufordeilingin hevur verið hesi árini:

### Vágarnar

Farið varð undir at gera fast samband seinast í 80unum. Arbeiðið varð steðgað orsakað av kreppuni. Arbeiðið varð síðani tikið uppaftur og er um at vera liðugt. Við anlegsjáttanini hevur henda ætlan kostað landskassanum umleið 200 mió.

### Suðuroy

Farið er undir at byggja nýggjan Smyril. Saman við teimum íløgum, sum skulu gerast á infrastrukturin sum t.d. tillaga atløguviðurskifti, samferðsluhavn o.s.v. verður kostnaðurin helst umleið 400 mió.

### Sandoy

Farið var undir at gera ferjulegu á Gomlurætt í áttatiárunum og óváttað tølsiga, at prísurin lá umleið 200 mió. Síðani er nýggi Teistin komin. Samlaða íløgan er umleið 300 mió.

### Borðoyggin

Ímeðan landskassin hevur sett verkætlanir í gongd fyri umleið eina milliard viðvíkjandi trimum av fýra randarøkjunum, verður fjórða og størsta økið framvegis serviserað við eini 30 ára gamlari loysn, sum bæði er ótíðarhóskandi og til tíðir ónýtilig. M/F Dúgvan er frá 1969. Ferjulegan í Klakksvík er frá 1973. Ferjulegan í Leirvík er nakað nýggjari, men avlýsingarnar eru nógvar, av tí at tað er trupult at nýta ferjuleguna á ávísari ætt.

### Cost-benefit lýsing

Í januar 1998 lat vinnumálastýrið eina samferðsluverkætlan úr hondum, ið m.a. lýsti kostnaðnyttu kanningar av týðandi verkætlanum, herundir ferðingini um Leirvíksfjørð. Sambært hesi kanning var fast samband umkostningsneutralt samanborið við dagført ferjusamband.

Nærum fimm ár eru nú farin, síðani kanningin var almenn, og tað ber ikki til annað enn at ásanna, at fyritreytirnar hava flutt seg til fyrimuns fyri føstum sambandi. Men eftir at hava lisið frágreiðingina frá vinnumálastýrinum eru vit kortini sannførdir um, at við táverandi fyritreytum var tað eisini ein stórur fyrimunur landsbúskaparliga at fremja fasta sambandið. Hetta kemst av, at eftir okkara metan so undirmetir frágreiðingin spardan bíðikostnað og forðingarkostnað, umframt fyrimunirnar við fullum ferðslufleksibiliteti. Fleiri faktorar, sum tosa til fyrimuns fyri føstum sambandi, tykjast ikki at vera við, av tí at vit ikki kenna teir frammanundan, og tískil kunnu teir ikki kvantifiserast. Vit bakklókskapi kunnu vit lýsa nakrar fáar, sum hava ávirkað síðani 1998.

- Í 1999 og 2002 var Starvsmannafelagið í verkfalli í fleiri vikur. Í slíkum føri er forðingin á ferjuøkinum 100%, og fíggjarligur missur er hareftir, umframt missur í vælferð (comfort).
- Dúgvan er tvær ferðir tikin úr sigling í "ótíð", m.a. tá hon tók botn í Leirvík, umframt tá ferjan breyt motorin. Í báðum førum var neyðugt at bera skjótt at og leiga avloysaraskip við eykafíggjarlóg ella við at flyta Smyril til Klakksvíkar. Hesar útreiðslur hevði landskassin spart við føstum sambandi.

Av øðrum fyrimunum fyri landskassan kann nevnast, at fólk ferðast nógv í almennum ørindum um Lerivíksfjørð. Klakksvíkin hevur m.a. sjúkrahús, teknískan skúla, sjómansskúla, HF-skeið, Trygdarmiðstøð o.s.v..

Ein cost-benefit lýsing verður vanliga brúkt, tá metast skal um fleiri alternativ. Men nú spurningurin um ferjusamband um Leirvíksfjørð er heilt slept, og eittans alternativ er eftir, er spurningurin: Nær er mest gangnligt samfelagsbúskaparliga at fara undir verkætlanina?

Her kann fyrst nevnast, at ein tunnil vanliga verður mettur at vera ein permanent íløga, sum ikki "slítist" við tíðini, og tí ikki skal avskrivast. Og jú fyrr ein slíkur kemur, jú skjótari fæst nytta úr íløguni. At bíða við einari íløgu til tess at spara, er eisini ein spurningur um, hvussu við definera hugtakið "sparing". Í politiskum málbrúki er sparing tað sama sum at sleppa undan at seta eina upphædd á fíggjarlógina í dag ella í morgin, soleiðis sum tað eisini verður sagt í viðmerkingunum til uppskoti, sum skal viðgerast í Løgtinginum í dag.

Í privat- og virkisbúskaparligum høpi verður vanliga spurt: sparing í mun til hvat? Ímynda vit okkum eini sethús við stórum takleka, og eigarin bíðar 2 ár við umvælingini fyri at "spara", so er spurningurin, hvussu nógv er "spart" , tá ið hædd er tikin fyri avleiðingini av lekanum. Tað sama kann gera seg galdandi, tá ið talan er um at útseta eina almenna íløgu.